# Bjørn Kalsø má rudda allan iva av vegnum

**– Tað einasta rætta er, at Bjørn Kalsø noktar at avgreiða fleiri skipamál, til øll ivamál eru ruddað av vegnum. Men ístaðin fyri at gera tað einasta rætta, stingur landsstýrismaðurin høvdið í sandin, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður**

HANDIL VIÐ SKIPUM OG LOYVUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Tað, sum nú fer fram, kann enda við eini vanlukku og tí er tað jánkasligt, at Bjørn Kalsø bara stingur høvdið í sandin ístaðin fyri at gera nakað við tað beinanvegin, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*

– Tað er nóg ringt, at hetta hendir innanlands. Men tann heilt stóra vanlukkan er, at nú sær tað út til, at tað eru útlendingar, sum fara at eiga okkara fiskiríkidømið.

Eins og mong onnur, er eisini Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri sjálvstýrisflokkin, ógvuliga ørkymlaður av tí, sum fer fram í føroysku fiskivinnuni í løtuni.

Her verður hugsað um tey risastóru skipahandlar, sum eru gjørdur seinastu tíðina fyri hundraðtals milliónir. Í hesum sambandi verður ført fram, at fyri tað fyrsta eru tað í veruleikanum útlendingar sum keypa fiskiloyvir og kvotur í Føroyum ígjøgnum føroyskar stráðmenn og í øðrum lagi kunnu teir reiðarar, sum selja skip og loyvi, stinga allan sølupeningin skattafrítt í lumman.

Kári P.Højgaard heldur, at hetta er ein ólevnaður, sum má halda uppat í stundini og hetta má politiski myndugleikin taka upp beinanvegin.

– Tað sær út til, at tað eru so stór hol í lógini, at hetta ber til. Men tað er eisini greitt, at hetta er í stríð við andan í lógini.

Hann sigur tí at tað einasta rætta er, at hesi holini verða typt beinanvegin.

– Men inntil holini eru typt, eigur Bjørn Kalsø at leggja allar umsóknir um at flyta fiskiloyvi og kvotur í eina skuffu, so at ongin umsókn verður avgreidd, fyrrenn full greiða er fingin á lógina.

– Ein vandi við øllum hesum er, at føroysk vinnulívsfólkselja síni feløg og fara úr vinnuni. Men tað eru mangan útlendsk vinnulívsfólk, ið koma ístaðin.

Kári P Højgaard heldur í hesum sambandi, at tað er ein stór andsøgn ímillum at stremba eftir politiskum sjálvbjargni, samstundis sum vinnutólini, ið skulu lívbjarga okkum verða avreidd á útlendskar hendir – og tað enntá við lógini um fiskidagaskipanina í hondini, har tað annars stendur, at útlendingar kunnu í mesta lagi eina 1/3 av einum skipi.

Hann vísir á, at tað hevur verið nógv ført fram um gjøgnumskygni.

– Men í hesum føri er veruleikin tann, at vit hava onki gjøgnumskygni yvirhøvur og sostatt hava vit onki innlit í hvussu veruliga sambandið er ímillum føroysk feløg og útlendsk feløg.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap, verður staðfest, at fiskiríkidømið er ogn Føroya Fólks, men tá ið ogn Føroya Fólks verður keypt og seld fyri slíkar risa upphæddir, sum her er talan um, má tað vera eitt krav, at allir upplýsingar verða lagdir á borðið.

Hann vísir í hesum sambandi á, at honum vitandi, kunnu útlendingar ikki gera íløgur í náttúruríkidømið í Íslandi.

– Verður føroyska fiskiríkidømið avgreitt á útlendskar hendir, verður tað ein vanlukka, staðfestir formaður sjálvstýrisfloksins.

Kári P. Højgaard kann yvirhøvur ikki góðtaka, at Bjørn Kalsø segði við Útvarpið í gjárkvøldið, at, sum støðan er nú, er onki at gera við hetta, men at arbeitt verður við at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap og at hetta má bíða til tá.

– Hetta er onki uttan ein undanførsla og hetta er at stinga høvdið í sandin. Men tað sær út til, at tað er rættilig ferð komin á handilin við skipum og loyvum og tað ber ikki til at siga, at vit skulu bíða í vikur ella mánaðir eftir eini avgerð.

– Tað er tað sama sum at boða frá, at tey, sum ætla sær at keypa ella selja, skulu bera skjótt at, tí um nakrar mánaðir verður lógin herd.

– Tí er tað einasta rætta, at Bjørn Kalsø steðgar á og noktar fyri at avgreiða fleiri mál av hesum slagnum, fyrrrenn øll ivamál eru beind av vegnum, sigur Kári P. Højgaard.

– Tá ið iví verður sáddur um, at lógin verður misbrúkt, eigur landsstýrismaðurin undir ongum umstøðum at avgreiða fleiri mál av hesum slagnum, til allur ivi er burtur, leggur hann afturat.

### Ein vavgreytur

Kári P. Højgaard sigur, at eitt, sum ger støðuna serliga ivingarsama, er, at eftir hansara tykki er her talan um ein løgfrøðiligan vavstur, sum greiða eigur at fáast á.

Tað stendur beinleiðis í lógini um vinnuligan fiskiskap, at fiskiríkidømið er ogn Føroya Fólks.

– Men í veruleikanum er fiskiríkidømið blivið ogn hjá reiðarunum. Loyvini verða útskrivað einaferð um árið, men hvørja ferð, tey verða útskrivað, eru tey galdandi í 10 ár. Sostatt er loyvini í veruleikanum óendalig.

– Samstundis verða fiskiloyvini skrivað í roknskapirnar hjá feløgunum sum ein ogn, eins og reiðarin altíð kann selja tey og stinga vinningin í lumman.

– Spurningurin er, um hetta er í samsvari við lógini um vinnuligan fiskiskap, at tað er staðfest, at fiskiríkidømið er ogn Føroya Fólks.

# Má takast upp beinanvegin

**– Tað, sum hendir í fiskivinnuni nú, er eitt mál, sum samgongan má taka upp beinanvegin, heldur Kristian Magnussen, formaður javnaðarfloksins á tingi**

HANDIL VIÐ SKIPUM OG LOYVUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eisini Kristian Magnussen, formaður í javnaðarflokkinum á tingi, er eisini við á tí liði av politikarum, sum halda, at málini um at keypa og selja skip og fiskiloyvi fyri risaupphæddir, eiga at verða tikin upp á politiskum stigi.

Hann sigur, at javnaðarflokkurin hevði tað sum eitt punkt í síni valskrá til seinasta løgtingsval, at fiskidagalógin skuldi endurskoðast og at ein fiskidaga- og loyvisbanki skal setast á stovn, sum skal umsita øll fiskirættindi.

Men samstundis ásannar hann, at ov lítið er hent á hesum øki.

– Tað sum vit hava frætt um seinastu tíðina, ger tað í hvussu so er ikki minni átrokandi at taka hesi viðurskifti upp, staðfestir hann.

Tí heldur hann ikki at tað er rætt at bíða við hesum, so at tað ikki verður tikið upp, fyrrenn øll lógin um vinnuligan fiskiskap verður endurskoðað.

Hann sipar til, at nú eru upphæddirnar so stórar at tað ber ikki til at lata sum onki, samstundis sum um at tað eisini tykist sum um at útlendingar fáa ein størri og størri leiklut í okkara fiskivinnu.

– Tí er hetta ein spurningur, sum eigur at verða tikin upp fyri seg og tað eigur at vera gjørt beinanvegin, tingið kemur saman aftur á Ólavsøku, sigur løgtingsmaðurin.

Hann heldur kortini ikki, at tað er rætt at nokta fyri at avgreiða fleiri skipamál, til greiða er fingin á viðurskiftunum.

– Tað vildi verið at sett marknaðarkreftirnar úr gildið og tað er ikki okkara uppgáva sum politikarar. Okkara uppgáva er at taka okkum saman og fáa greiði á viðurskiftunum og tað eiga vit at gera sum skjótast, sigur hann.

Í hesum sambandi heldur hann, at tað er neyðugt at fáa ein fiskidaga- og loyvisbanka, sum allur handil skal ganga í gjøgnum og soleiðis, at prinsippið varð staðfest um, at tað er landið sum eigur loyvi og rættindi og ikki tann einstaki reiðarin og at reiðarin bert hevur brúksrættin og sostatt ikki kann handla við loyvunum og stinga vinningin í lumman.

– Fæst ikki semja um tað, eigur okkurt annað at verða gjørt fyri at sleppa undan tí, sum nú fer fram við fólksins ogn, sigur Kristian Magnussen.



*– Hetta er ein trupulleiki, sum vit eiga at taka upp beinanvegin, uttan at bíða, heldur Kristian Magnussen, formaður javnaðarfloksins á tingi*